# eiða fisk



- Her er gott at vera, sigur 17 ára gamli Rúni Lobo Festirstein

# Trupulleikar eru altíð í einum hjúnabandi

**Seinni í hesum mánaðinum verður hjúnabandsskeið hildið á Hotel Vágum.**
**– Skeiðið er bæði fyri yngri hjún og fyri tey, sum hava verið gift leingi, sigur Jóni Johannesen, sum hevur fyrireikað mong slík skeið áður**

HJÚNABAND
*Snorri Brend*

**Skeið:** Vikuskiftið 26. til 28. januar verður hotellið í Vágum karmur um eitt skeið sum er ætlað hjúnum.

Á skeiðnum verður undirvíst í mongum ymiskum evnum, sum hava við samlívið millum mann og konu at gera.

Skeiðið verður skipað við fyrilestrum, bólkaarbeiði og práti millum luttakararnar og skeiðleiðaran, Eivind Frøen úr Noregi.

– Hann hevur í fleiri ár undirvíst í slíkum evnum. Sigast má, at hann dugir sera væl, staðfestir Jóni.



*Mong kenna Eivind Frøen sum talara á møtum. Men hann dugir eisini at undirvísa hjúnum*

Á skeiðnum er pláss fyri í mesta lagi 24 pørum. Í fjør var skeiðið fultteknað við bæði yngri og eldri hjúnum.

– Okkurt árið vóru 35 pør á leguni, men nú hava vit avmarkað okkum til 24 pør, sigur fyrireikarin.

## Steðga á

Hjúnarlegan í Vágum byrjar fríggjakvøldið 26. januar, tá allir luttakararnir savnast saman við skeiðleiðaranum, Eivindi Frøen.

Nógv kenna Eivind Frøen frá óteljandi vitjanum her á landi sum talari á møtum.

– Men tað eru eisini mong hjún sum hava verið sera fegin um ta undirvísingina, hann hevur givið á hesum hjúnalegunum, sigur Jóni.

Í upplegginum til leguna verður staðfest, at neyðugt er hjá hjúnum at skilja hvørt annað betri. Hóast hjúnabandið er gott, koma altíð trupulleikar sum mugu og skulu loysast.

Fyri at geva ungum sum eldri hjúnum nøkur amboð at arbeiða víðari við, verður henda legan fyriskipað.

– Her fáa hjúnini, mitt í eini stressaðari tíð, møguleika at steðga á og geva sær tíð til hvørt annað.

– Sjálvt um fólk ikki hava trupulleikar at dragast við, kunnu tey kortini koma við fyri at styrkja og upplíva hvørt annað, sigur hann.

# Gamal áhugi fyri lestrum

**Beint undan jólum kom út nýggj føroysk lestrabók »Trúarorðið«, sum danski presturin Flemming Frøkjær-Jensen hevur skrivað. Gunnar Reynslág týddi lestrarnar til føroyskt.**

BØKUR
*Snorri Brend*

Danski presturin skrivaði hesar prædikurnar fyri júst 30 árum síðani, meðan hann virkaði á oynni Fur í Límfjørðinum. Tær eru til fyrru tekstarøð og eru týddar yvir eitt ávíst tíðarskeið.

Gunnar Reynslág av Argjum hevur týtt teir til føroyskt. Júst hetta við lestrum er ikki nýkomin áhugi hjá honum.

Áhugan fyri lestrum fekk Gunnar í heiminum hjá verforeldrum hansara.

– Her varð lestur lisin hvønn sunnumorgun og hvønn halgimorgun. Og hetta gav mær íblástur at kanna, hvat var av lestrarbókum, sigur Gunnar Reynslág í fororðinum.

## Áheitan og stuðul

Tá hann seinni gjørdist deknur við Argja kirkju hugaði hann nógv um at fáa onkrar lestrar aftrat at lesa, tá prestur ikki var til gudstænastuna.

Hann staðfesti, at tað fanst nógv gott tilfari, hóast tað ikki var so nógv. Hann umsetti tá og las onkrar av hesum lestrum við onkrar av deknagudstænastunum.

Eftir at hava verið deknur í nøkur, kendi hann av álvara ein tørv á at fáa nýggjar lestrar til vega, soleiðis at teir kundu gerast fjølbroyttari.

– Hetta byrjaði í 1999 við einstøkum umsetingum, sum eg brúkti einstakar ferðir. Nakað eftir hetta bæði heitti og stuðlaði trúboðarin, Johannes Mortensen mær til at umseta alla lestrarbókina hjá Flemming.

– Tað álit takki eg honum fyri, sigur Gunnar í fororðinum, nú henda bókin við lestrum til fyrru tekstarøð í kirkjuárinum er komin út.

Heimamissiónsforlagið í Nesvík gevur út bókina, sum kostar smáar 400 kr. í handlunum kring landið.




*Hent lestrabók til fyrru tekstarøð í kirkjuárinum*